

# Jólaskipið til Havnar leygardagin

Leygardagin klokkan 15 skal jólaskipið ætlandi leggja at bryggju í Vágsbotni.

Skiparin sigur, at veðurvánirnar eru ikki góðar næstu dagarnar, men ætlanin er so at leggja at bryggju undir Bátafelagnum.

- Havnarfútin sigur, at har er gott at liggja. Vit fara sum altíð at royna at vera í Vágsbotni kl. 15 seinnapartin, tí tá er enn somikið ljóst, at vit síggja tykkum øll, og tit síggja okkum, eru boðini frá jólamanninum, sum sjálvandi er umborð.

- Yvir fartelefonina tosaði eg nú eitt kvøldið við djarva jólamannin, sum tendraði jólatræið á Vaglinum. Hann fortaldi mær, at norðan fyri kioskina, í tí tey kalla Tinghúsgarðinum, standa nakrar jólasmáttur, sum eru ógvuliga fittar og hugnaligar. Har hendir alt møguligt fram til jóla. Hann segði eisini, at har er eitt hús, sum er pyntað og gjørt klárt til hansara, og at har fór hann at búgva.

- Eg veit ikki, um tað passar, tí hann sigur so nógv. Men eitt er vist, hann og hinir jólamenninir, sum eru saman við honum, fara hvønn dag at vitja jólasmátturnar, tí har ber so væl til at tosa við børnini, sum eru í býnum. Har fara kór og tónleikabólkar at syngja og spæla jólasangir, fyri at vit øll koma í góðan jólahýr. Her umborð hava vit somuleiðis hoyrt, at í jólabýnum fara felagsskapir, skúlaflokkar og børn at skipa fyri jólasølu, har til ber at keypa sær okkurt heitt og leskiligt.

























